# Vælferðarsamfelagið skal varðveitast



Val
EDVA JACOBSEN

Ásannað verður, at familjan er ein av grundstuðlunum undir einum vælvirkandi samfelag. Tí eiga allar umstøður, sum eru við til at skapa fyritreytir fyri einum vælvirkandi familjulívi, at gerast so góðar sum til ber.

Sambandsflokkurin fer støðugt at arbeiða fyri:

Teimum sjúku, veiku og gomlu

Barnafamiljunum

Fyri Sambandsflokkin er vælferðarsamfelagið og tað persónliga frælsið hjá tí einstaka meira virðismikið enn nationalistiskar hugsjónir, og flokkurin fer tí ongantíð at seta vælferðina upp á spæl fyri at gera Føroyar meira sjálvbjargnar. Einki skal gerast í óðum verkum, men flokkurin hevur tað mál, at vit í Føroyum skulu hava sama livistøði sum tey hava í hinum norðurlondunum.

Dygdin í einum vælferðarsamfelag verður í stóran mun mett eftir, hvussu samfelagið fer um teir veiku samfelagsbólkarnar.

Okkara hjartamál er at varðveita Føroyar sum eitt vælferðarsamfelag hvar tryggleikin og framburður verða sett í hásæti.

# Skulu Føroyar vera fuglafríðar ella verða tær fuglafríar

Hetta ljóðar kannska sum ein smart mótsøgn, men er ikki ein óhugsandi veruleiki, sum vit úr køldum dreymi, kunnu vakna upp til.

Gamaní, so hevur svartfuglurin tað ikki so gott - men havhestin hava vit so eftir sigur onkur – TÍVERRI so talar myndin ikki so.

Hvussu verður við heiðafuglinum tá ið flatmaðkurin hevur spjatt meir um seg og troðka reyðmaðkin burtur, hvussu verður tá við føðini?

Vit mugu taka okkum væl av teimum fuglasløgunum sum enn eru eftir og ænsa væl eftir tilhaldsstøðunum hjá teimum fuglasløgunum sum lívbjarga sær í øðrum umstøðum enn teimum omanfyri nevndu.

*Jógvan í Løðuni*
*Eiði*





# International Fellowship

The recently started, International Fellowship will arrange a meeting Saturday, 1 of december.

These meetings are intended for all newcomers and foreigners in the Faroes from countries outside Scandinavia and the location for these meetings is in the basement of Meinigheitshúsið in the heart of Tórshavn, i. e. the large red building next to SMS and Føroya Banki.

Figures show that quite many foreigners live in the Faroes. The general idea of initiating the community, International Fellowship, in the Faroes, was to find a place, in which people with different culture, background and language than the Faroese, could find a place to meet and talk to people in similar situation. These meetings are organized in a relaxed, informal and cosy atmosphere, in which everyone feels at ease and can talk to others in a similar situation and often with identical experiences.

If you have children, you are welcome to take them with you. Meinigheitshúsið has a distinguished playroom. In addition, it is possible to enjoy a cup of coffee and perhaps some homemade pastries for a small fee.

All International Fellowship meetings will be on the first Saturday of each month. The forthcoming meeting is thus scheduled 3.00 pm, November 3. in Meinigheitshúsið, the large red building next to SMS and Føroya Banki.

If you need more information, please contact Thurid Brend on 581520

***Best regards***
***Thurid Brend***

# Ein stórur dagur fyri Sandoynna!

EYÐUN MOHR VIDERØ



Nú hevur løgtingið við aðru viðgerð samtykt málið um undirsjóartunnil millum Streymoy og Sandoy, so roknast má við, at vit nærum eru komin á mál.

Hetta gevur okkum bjartar vónir um framtíðina fyri sandoynna. Enn er oyggin so væl mannað, at ungfólk í menning alast upp her, og tá nú umstøðurnar gerast til, at hesi kunnu koma aftur/verða verandi eftir lokna útbúgving, so er bæði gleði og útlit fyri ljósari framtíð, eins og onnur fara at flyta higar!

Men- restin hendir ikki av sær sjálvari. Tað standa stórar avbjóðingar fyri framman hjá okkara politikarum her í oynni.

Eitt er at fáa sjálvt arbeiðið gjørt, men líka so tíðningarmikið er, at oyggin er brynjað til at taka ímóti avbjóðingini, tá arbeiðið er liðugt.

Góða ferðasambandið við meginøkið setir krøv um munandi býarætlanir við neyðunum grundstykkjum og øðrum, ið hartil hoyrir.

Neyðugt verður at hava nokk av hóskandi og planeraðu ídnaðarøkjum, og tað er uppgáva hjá kommununum!

Men seinast og yvir øllum er týdningurin av, at vit fáa ein nýggjan og hóskandi kommunubyggnað í oynni!

So vónandi verða allar virknar og vælviljaðar kreftir í oynni samlaðar nú, so vit eru fullbrynjaði til framtíðina!

# Kaos og hurlivasi í løgtinginum?



Val
BJARNI DJURHOLM
www.djurholm.fo

**Støðan er betur enn til valið 2002, umframt at uppskotini hjá landsstýrinum eru við í fíggjarlógini fyri 2008**

Sambært miðlunum, so er kaos í tinginum og landsstýrið hevur skuldina.

Løgtingsstjórin verður tikin sum inntøka fyri pástandinum. Men hvør var so substansurin í tíðindunum? Val er 4. hvørt ár. Tað er eingin nýggjheit, og er støðan øðrvísi enn til onnur val?

Til seinasta framløgudag 4. mars 2002 hevði tingið fingið 106 lógaruppskot. Í ár er talan um knapt 100.

Í 2002 komu 52 lógaruppskot á tingborð frá 15. januar til seinasta framløgudag, sum var 4. mars tað árið. Valið varð útskrivað hálvan mars 2002.

Av teimum 52 uppskotunum í 2002 komu 40 í tingið frá 26. februar - t.e. júst eina viku undan seinasta framløgudegi og minni enn 3 vikur undan, at valið var útskrivað.

Av teimum 40 málunum komu 16 uppskot á tingborð seinasta framløgudag, sum var 4. mars 2002. Tað vóru tí minni enn tvær vikur at viðgera seinastu 16 málini, saman við øllum hinum, sjálvsagt.

Samanborið við støðuna í 2002, so er lítið ónormalt við verandi. Og soleiðis hevur tað altíð verið.

Einasti munur er, at valið komandi er 19. januar, og ikki 30. apríl sum í 2002. Tí er alt forskotið 3 mánaðir aftureftir.

Vanligt er, at fá mál eru frá ólavsøku til jóla. Í ár var so neyðugt at koma fyrr úr startholinum, tað er eisini gjørt. Tað er einasti munurin.

Annars vóru flestu nú framløgdu uppskotini við í yvirlitinum hjá løgmanni, sum tingmenn fingu á ólavsøku í ár. Eingin hevði nakra viðmerking tá. So heldur ikki har er nakað nýtt undir sólini. Tí er kritikkurin nú ikki annað enn vanliga spinnið.

**Landskassin í góðum hondum**

Av málum frá landsstýrinum, sum ikki eru fráboðað í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2008, eru bert tvey – annað er um kringvarpshúsið, hitt er um sendistøðir.

Eingi onnur uppskot frá landsstýrinum gera støðuna hjá landskassanum øðrvísi enn ætlað eftir fíggjarlógaruppskotinum fyri 2008. Tí er tað reingjan av veruleikanum og óseriøst at geva fólki ta fatan, at landskassin er vorðin eitt sjálvtøkuborð. At landsstýrið hevur slept endanum. Tað er beinleiðis ósatt.

Allar útreiðslurnar til øll uppskotini eru við í fíggjarlógini fyri 2008, sum var lagt fyri løgtingið í september í ár.

At hálvthundrað andstøðuppskotini afturímóti fara at kosta landinum eina rúgvu av peningi, tað er ein onnur søk, sum andstøðan má svara fyri. Har er sum vera man einki sett av á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2008.